## Gert og Arnbjørn um hvønn annan

- Gert hevur altíð verið har fyri meg. Vit hava altíð brúkt tíð saman. Hann klárar seg fínt í verjuni hjá EB-Streymi, sigur Arnbjørn.

- Arnbjørn er kanska tann besti fótbóltsleikarin í sínum aldri. Hann er skjótur og góður við høvdinum. Hann skal nokk gerast fastur maður á landsliðnum. Tað er ikki so galið at hava ein beiggja, sum eg altíð kann práta við.



## Arnbjørn um føroyskan mat

Mær dámar okkurt, og okkurt dámar ikki. Ræst kjøt dámar ikki. Ræstur fiskur er tað frægasta, eg fái av tí føroyska.

# hvønn annan fyri uttan




her sæst saman við beiggjanum Arnbjørn Hansen

Mynd: Jens Kr. Vang

á sama liði í hondbólti og fótbólti, og vit arbeiða báðir hjá Poul Hansen, so tú kanst siga, at vit nýta nógva tíð saman, sigur Arnbjørn.

### EB-Streymur er ein brøðrasamkoma

- Annars eru fleiri pør av beiggjum á liðnum hjá EB-Streymi. Tað eru eisini nakrir yngri beiggjar hjá núverandi formulaleikarum á veg fram, so tað verða kanska enn fleiri, sigur Gert, og Arnbjørn leggur afturat.

- Liðið er ein ordilig brøðrasamkoma, sigur hann, og allir flenna.

Fótbólturin fyllir sera nógv í lívinum hjá Gert og Arnbjørn. Teir hava lagaligar treytir á arbeiðsplássunum, um teir skulu spæla dyst ella venja. Tað verður eisini tosað nógv um fótbólt á arbeiðsplássinum, og teir hyggja eisini nógv at fótbólti í sjónvarpinum.

- Fótbólturin kemur mangan framum alt annað, siga teir báðir.

Teir hava báðir gingið í fólkaskúla, og síðani hava teir arbeitt. Teir hugsa ikki enn um at fáa sær víðari útbúgving. Nú er tað fótbólturin, sum skal dyrkast.

### Lansliðið er eitt herðaklapp

Arnbjørn hevur verið inni og snúsað til landsliðið. Hann vil fegin verða úttikin aftur. Gert harafturímóti er ikki so bjartskygdur um at sleppa á landsliðið.

- At verða úttikin til landsliðið er eitt stórt herðaklapp. Tað hevði ikki verið so galið at sloppið við aftur, men nú er U21 landsliðið komið, so eg fari at royna at koma á tað fyrst, sigur Arnbjørn.

- Eg havi kenslu av, at eg ongantíð komi á landsliðið. Onkursvegna manglar mær tað síðsta. Kanska venjararnir halda, at eg eri ov hálvur, tí at eg eisini spæli hondbólt, sigur Gert, sum tó vónar, at hann sleppur at umboða Føroyar í fótbólti.

- Tað er dreymurin hjá einum hvørjum føroyingi at sleppa at spæla við landsliðnum, sigur hann.

### Fáa tilboð frá øðrum

Bæði Arnbjørn og Gert fingu tilboð frá øðrum feløgum í steðginum.

- Eg havi fingið okkurt tilboð, men hjartað liggur hjá EB-Streymi. Tað skulu í øllum førum nógvir pengar til fyri at lokka meg til eitt annað felag, sigur Gert.

- Okkurt felag ringdi eisini til mín, men eg valdi at vera verandi í EB-Streymi, sigur Arnbjørn.

Teir høvdu tó báðir tikið av einum møguligum sáttmála við eitt útlendskt felag.

- Tað er sjálvandi dreymurin, men eg veit ikki, hvussu veruligt tað er. Møguleikin er kanska vorðin størri, eftir at eg var á landsliðnum, men tað er ikki nakað, sum eg gangi og hugsi um hvønn dag, sigur Arnbjørn.

- Eg eri helst vorðin ov gamal. Tú skalt jú vera so ungur sum gjørligt, tá ið tú fert avstað, sigur Gert.

### Fara at reisa seg í ár

Teir vilja nú líta frameftir móti komandi kappingarárið, eftir at síðsta kappingarár endaði við einum stórum vónbrotið, tá ið EB-Streymur misti gullið í seinasta leikumfarið.

- Tað var óbeskriviliga skuffandi í fjør, sigur Gert.

- Eg haldi, at øll tóku fyri givið, at vit fóru at vinna, men tá ið samanumkom, tordu vit ikki at vinna, sigur Arnbjørn.

- Vit eru komnir yvir tað nú, men tað var ikki stuttligt fyrstu tíðina eftir kappingarlok í fjør.

Ta ávirkaði alt, og vit høvdu als ikki hug at fara til arbeiðis beint eftir kappingin var liðug, siga teir báðir.

Teir vóna at EB-Streymur megnar at vinna meistaraheitið í ár, men teir vilja tó ikki seta vónirnar ov høgt, áðrenn kappingin er byrjað.

## Fakta

### Gert Hansen

Føddur 25.07.1984
Forlovaður
Arbeiðir í goymsluni hjá Poul Hansen heilsølu
Byrjaði at spæla fótbólt sum 7 ára gamal
Spældi fyrsta dyst í bestu deildini sum 18 ára gamal

## Fakta

### Arnbjørn Hansen

Føddur 27.02.1986
Stakur
Arbeiðir í goymsluni hjá Poul Hansen heilsølu
Byrjaði at spæla sum 7 ára gamal
Spældi fyrsta dyst í bestu deildini sum 18 ára gamal